# Framtíðin varð seld við skipinum

**Tá Sp/f Nakkur mátti selja Jógvan S., varð virði av framtíðar inntøkumøguleikum samstundis realiserað. Tað metti Føroya Rættur, sum ikki gav reiðarínum viðhald í, at endurgjald skuldi veitast fyri mistar framtíðar inntøkur**

JÓGVAN S.
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dómur fall í dag um málið um veiðirættindini hjá Jógvan S.

Kjarnin í málinum er veiðiloyvið, sum av órøttum varð tikið frá skipinum, tí hetta upprunalgia hevði ein klausul um, at skipið ikki skuldi aftur í føroyska flotan, tá tað varð selt til Noregs á sinni.

### Endurgjald fyri at liggja

Rætturin hevur síðan gjørt av, at tað var ein ólóglig avgerð, tá fiskiloyvið varð tikið frá skipinum, og tað er hetta, sum hevur ført til endurgjaldskravið. Í fyrsta lagið vildi Sp/f Nakkur hava endurgjald fyri staðfestar útreiðslur, sum stóðust av, at skipið varð lagt. Tann parturin av endurgjaldinum var 2,6 mió kr.

Hin parturin av endurgjaldskravinum var krav um endurgjald fyri mistar framtíðar inntøkur. Reiðaríið førdi í rættinum fram, at avgerðin um at frátaka fiskiloyvið tók somikið fast fíggjarliga, at teir ikki megnaðu at reiða bátin útaftur. Teir noyddust tí at selja bátin undir umstøðum, sum vóru álíkar eini tvingsilssølu.



*Saksøkjarin, sum í rættinum var umboðaður av Jógvani Páll Lassen, fekk ikki viðhald í, at talan var um framtíðar inntøkumiss, tá Jógvan S. varð seldur*

Sakførarin hjá fiskimálaráðnum, Eyðfinnur Jacobsen, segði, at fiskimálaráðið viðurkennir sær tapið, sum er staðfest og er sinnað at veita endurgjald fyri tað. Men hann meinti ikki, at endurgjald kundi veitast fyri eitt framtíðar tap, sum ikki er prógvað. Serliga talaði tað ímóti endurgjaldið, at reiðararíið seldi Jógvan S fyri 5,7 milliónir og sostatt frátóku sær møguleikan at vinna pening.

### Framtíðin fór við søluni

Og tað var júst hetta seinasta, sum dómarin legði størstan dentin á í sínum úrskurði. Har varð staðfest, at tá reiðaríið seldi Jógvan S., innihelt sølan eisini teir framtíðar inntøkumøguleikar, sum skipið hevði. Og at saksøkjari ikki hevði sannlíkisprógvað, at nakar inntøkumissur var umframt sølupeningin.

Hinvegin fekk reiðaríið viðhald í teimum 2,6 mió, sum Fiskimalaráðið eisini hevði góðkent sum endurgjaldskrav. Hartil kemur prosessrenta og sakarmálskostnaður, soleiðis at samlaða rokningin til Fiskimálaráðið varð góðar tríggjar mió kr.

### Vilja umhugsa dómin

Jógvan Páll Lassen er sakførari hjá Sp/f Nakkur, sum átti Jógvan S., tá ólógliga avgerðin um at taka veiðiloyvið frá skipinum varð tikin.

Og hann var ikki nøgdir við úrskurðin, sum varð feldur í rættinum.

- Kravið var í tveimum bitum. Í fyrsta lagi var talan um beinleiðis inntøkumiss, sum stóðst av avgerðini. Tann partin hevur reiðaríið so fingið, og tí fáa allir kreditorar sítt, nú málið er endað.

- Hin parturin snýr seg um væntaðar inntøkur. Vit meta, at umstøðurnar, sum skipið varð selt undir, vóru mest sum átøkur eini tvingsilssølu, og at reiðaríið tí skuldi kompenserast fyri tey tíggju árini, sum veiðiloyvið í minsta lagi var galdandi. Tí partinum hava vit so ikki fingið viðhald í, og tað merkir – sum støðan er – at eigararnir hava mist sítt innskot, sigur Jógvan Páll.

Hann sigur, at avgerð enn ikki er tikin um, hvørt reiðaríið fer at kæra dómin. Fyrst og fremst skal hesin lesast ígjøgnum, og so hevur saksøkjari fýra vikur til at umhugsa hetta.

**-mørk**

### Verjin var nøgdur

Eyðfinnur Jacobsen var verji í málinum um Jógvan S. Í løtuni er sakførarin burturstaddur, men tá hann fekk boðini um úrskurðin, staðfesti hann, at talan var um nøktandi avgerð fyri Fiskimálaríðið.

- Vit hava longu ásannað, at reiðaríið hevur havt eitt tap á 2,6 mió kr., orsakað av ólógligu avgerðini um fiskiloyvið. Hinvegin hava vit ikki hildið, at saksøkjari hevur sandsynliggjørt ein framtíðar inntøkumiss. Tann møguleikan – meta vit – frásøgdu teir sær við at selja skipið, sigur Eyðfinnur Jacobsen í stuttari viðmerking.

# Nýtt ídnaðarøki við Borðoyarvík

**Klaksvíkar Kommuna hevur gjørt avtalu við Uppsalahaga um keyp av 14.000 fermetrum til ídnaðarøki við sjóvarmálan sunnan fyri bátahylin á Borðoyavík. 1. byggistig gevur 7-8 grundstykki, og góður møguleiki er fyri fleiri**

KLAKSVÍK

Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri upplýsir, at samráðingar seinastu tíðina hava verið millum býráðsumsitingina og umboð fyri Uppsalahaga um hetta keypið, sum nú er komið upp á pláss.

- Tað hevur skund hjá kommununi at útvega fleiri ídnaðargrundøki, og tí fegnist eg stórliga um, at henda avtala við Uppsalahaga nú er gjørd, sum ger tað møguligt hjá kommununi at koma víðari og byrja at fyrireika sjálvt byggibúningararbeiðið, sigur borgarstjórin.

- Kommunan hevur seinastu árini selt ella leigað eini 10 økir til vinnuvirki í Klingrugarði og á havnaøkinum. Men fleiri umsóknir liggja, og virkir eru, sum hava bíðað í fleiri ár, millum annað tí, at kommunan ikki hevur havt økir til júst teirra tørv. Fyrispurningar koma eisini dagliga til umsitingina um ídnaðarøkir til ymisk endamál. Tí er ætlanin, at hendan útstykkingin skal vera til blandaðan ídnað, og virkini, sum eru skrásett á bíðilistanum hjá kommununi, fáa fyrst tilboð um eitt øki.

Borgarstjórin er sannførdur um, at hetta nýggja ídnaðarøkið, tætt við munnan á Norðoyatunlinum, liggur sera væl fyri, bæði í mun til býin og við sera góðum ferðslumøguleikum til restina av landinum.

- Í sambandi við nýggju vegaføringina til Norðoyatunnilin er nýggj íbinding gjørd til bátahylin, og hendan verður eisini atkomuvegur til nýggja ídnaðarøkið.

- Hesin atkomuvegur er gjørdur við framtíðini í huga, og stórir treylarar sleppa ótarnaðir tvørtur um íbindingina. Ætlanin er at tilevna útstykkingarvegin soleiðis, at arbeiðast kann víðari við vegi út á Taravík, har eitt annað býarskipanarliga áhugavert øki er.

- Full semja er í býráðnum um, at nýggja ídnaðarøkið á Borðoyavík skal fremjast skjótast tilber, og ætlanin er, at fyrstu stykkini skulu latast seinni í ár, sigur Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri í stuttari viðmerking.